

betri DEILDIN

# DYSTARSKRÁ

## 23. UMFAR 25/09/2023

# B36 v HB

#VITERUB36

ANDY ROBSON TIPS

J&K

J&K PETERSEN
www.jkp.fo







## FÓTBÓLTSFELAGIÐ B36
FC Tórshavn

Gundadalur, Postboks 1136
FO-110 Tórshavn, Føroyar
tel. +298 311936, fax +298 318036
b36@b36.fo

Kontonummar (Limagjald og stuðul):
9181 495.136.2 í Betri Banka

**www.b36.fo**

## B36 DYSTAR**SKRÁ**

**Ábyrgd:** B36

**Myndir:** Bjarni Enghamar, Álvur Haraldsen, Sverri Egholm, Ingi Arge og onnur

FAROE SOCCER.com


ANDY ROBSON
TIPS


TÁ RÆTT
SKAL
VERA
RÆTT
ADVOKATSKRIVSTOVAN
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.
FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

Jolly


BYGMA
BALSLEV
STOLTIR LIÐSPÆLARAR
HJÁ B36
Bygma Balslev - Vegurin Langi - Tel. 345000 - balslev.fo

# GRANNASTRÍÐIÐ, SUM EG MINNIST BEST

**Vit siga vanliga, at grannastríðið millum B36 og HB eru millum friðarligastu grannadystirnar í øllum heiminum. Kensluliga stendur kortini nógv upp á spæl. Grannauppgerðirnar eru sum oftast umráðandi toppdystir, soleiðis er eisini hesaferð, men tær snúgva seg sanniliga eisini um heiður og æru, og um at vinna ella endurvinna rættin at prika fólkini hinumegin.**

Í goymsluni eru hópin av minnisríkum grannadystum. Tríggir fyrrverandi og ein núverandi B36-spælarar siga her frá teimum grannadystunum, sum teir minnast best sum spælarar.

*... framhald frá síðu 7*

**Jan Guttesen**
(160 dystir og 8 mál, 1993-2002)

- Grannauppgerðirnar eru altíð serligar. Í Havn verður tú uppvaksin við, at tað er B36 ímóti HB, og so er restin líkamikið. Eg vaks upp í 80unum, tá ið HB altíð var millum bestu liðini í landinum, meðan B36 rann millum bestu og næstbestu deildina. Eisini í okkara árgangi var HB tað besta liðið við Julian Johnsson á odda, ið vit eisini eiga okkara leiklut í. Vit runnu



*... framhald frá síðu 8*

aftaná, oftast sum nummar tvey. Hetta broyttist so líðandi í nítiárunum, og síðani var B36 sum oftast við yvirlutan í nógv ár. Seinastu árini hevur HB hinvegin havt munin, so her má vend koma í.

- Tað er serliga mánadagin eftir grannauppgerðirnar, at týdningurin av dystinum verður sjónligur. Hevur tú vunnið, so roynir tú at fara øll hugsandi ørindi í býnum fyri at heilsa upp á so nógv fólk sum tilber, kanska serliga HBarar. Hevur tú hinvegin tapt, so verður ikki farið til arbeiðis aftur fyrrenn týsdag ;-)

- Tað eru tvær, kanska tríggjar, grannauppgerðir, sum standa fremst í minninum. Báðar hálvfinalurnar í kappingini um løgmanssteypið í 2001 vóru minniligar. Vit vóru aftanfyri 1-0 í fyrru hálvfinaluni, men fingu vent dystinum. Eg skoraði sjálvur til 2-1, og vit vunnu 3-1. Uppleggið til seinnu hálvfinaluna var, at vit skuldu halda nullið so leingi sum

*... framhald frá síðu 9*

tilber. Eftir bara tveir minuttir gjørdi eg ein Jesper Olsen, og so var HB á odda 1-0. Fleiri málið komu tíbetur ikki, so tað hevði ikki stórvegis týdning tá avtornaði. Vit vunnu greipuna tað árið.

- Næstseinasti dysturin árið fyri, í 2000, var eisini sermerktur. HB kundi við einum sigri mest sum vissa sær føroyameistaraheitið. Fáir minuttir vóru eftir, tá HB fekk brotsspark. Teir vóru á odda 2-1, so rómurin var øgiligur í HB-húsinum. Tey vóru so vís í sigrinum, at tey fóru at skjóta fýrverkarí. Tróndur Vatnhamar, sum vardi málið hjá okkum, bjargaði hinvegin brotssparkinum, sum Allan Mørkøre skeyt. Lítla løtu seinni, í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat, fóru vit so í álop, og Egil á Bø javnaði til 2-2. Tað, sum fleiri fólk minnast best frá dystinum var, at meðan allir B36-spælararnir lógu í einum trunka frammanfyri B36-húsinum, so viltist eg

THETIS

# Timbur- & snikkaraarbeiði



Vit átaka okkum alt arbeiði innan fyri
bygging, umbygging og umvæling.

DygdarVerk

v/Jens Kristian Hansen, Bygningssnikkari • Tel. 56 30 30 • dygdarverk@gmail.com

*... framhald frá síðu 10*

oman ímóti HB-húsinum at jubla. Tað var fyrstu og einastu ferð, at eg havi jublað saman við HBarum.

Úrslitið bar í grundini við sær, at vit sendu FM suður til Vágs. Vikuna eftir taptu vit so eisini 2-1 á heimavølli fyri VB í síðsta og avgerandi umfarinum, sum var ógvuliga keðiligt...



*... framhald frá síðu 13*

## Klæmint Matras

(349 dystir og 24 mál, 2000-2014)



- Grannauppgerðirnar høvdu alt at siga. Tey árini, eg spældi, kappaðust B36 og HB sum oftast um føroyameistaraheitið, og tí var umráðandi at fáa stig í teimum dystunum. Tað vóru eisini ár, har annað av liðunum var aftarlaga á stigatalvuni,

*... framhald frá síðu 13*

men grannadystirnir vóru kortini sum oftast ein tættir dystir, sum kundi fara báðar vegir. Tað, sum var mest umráðandi, var IKKI at tapa dystin, og tað endaði av tí sama ofta við javnleiki.

- Eg minnist fleiri grannauppgerðir. 6-0 sigurin í 2006, og avgerandi dysturin á seinasta leikdegi í 2005, har vit, Skála og HB kundu vinna føroyameistaraheitið í síðsta umfari, vóru serligir. Eg havi eisini hug at draga fram dystin á seinasta leikdegi í 2011, tá ið vit longu høvdu



TEL
20 59 59

uno

eitt og alt

- Hvítvørur
- Køkar
- Baðirúmsmøblar
- Súkklur
- Skápsloysnir
- Brúsukabinur
- Vesikummur

*... framhald frá síðu 14*

vunnið føroyameistaraheitið. Vit vóru aftanfyri bæði 1-0 og 2-0, men í seinna hálvleiki stríddu vit okkum inn aftur í dystin og vunnu 3-2. FM-ballið var longu byrjað uttanfyri vøllin. Vit vunnu allar grannauppgerðirnar tað árið, so hetta var



el | net
Tel 60 00 60

Sjóbusiness
Góð sambond síðan 1919

faroeship.fo
FAROE SHIP

*... framhald frá síðu 18*

## Bergur Midjord

(162 dystir og 28 mál, 2002-2010)



- Grannadystirnir høvdu serligan týdning, tí HB var okkara størsti kappingarneyti. Vit kappaðust sum oftast við HB um føroyameistaraheitið. Rivaliseringin merkist týðiliga, tí spælarar og fjepparar kennast sera væl. Grannadystirnir vóru vanliga teir mest intensu, og flest áskoðarar vóru eisini til hesar dystirnar.

- Einstaka grannauppgerðin, sum eg minnist best, er sjálvandi, tá ið vit vunnu 6-0 á HB í 2006. Sjálvur skeyt eg




Bergur Midjord til 3-0




Bergur Midjord til 5-0

*... framhald frá síðu 18*

hattrick ta ferðina. Avgerandi og seinasti dysturin í 2005, tá ið vit vunnu 2-1 og vissaðu okkum føroyameistaraheitið, er eisini sera frammaliga í minninum.

- Ein hending, sum eg eisini minnist væl, var í august 2005, tá ið Heine Fernandez var spælandi venjari í HB. Vit vóru aftanfyri 1-0, og teir áttu innkast, tá ið Fernandez rendi albogan í bringuna á mær. Eg hugdi at dómaranum, sum ikki lat við seg koma. Fernandez gav mær ein alboga afturat, men dómarin floytaði heldur ikki ta ferðina. Tá ið hann so sendi albogan í bringuna á mær fyri triðju ferð, tveitti eg meg. Fernandez var vístur av vølli, og tað kom veruliga øði í grindina. Bara tveir minuttir seinni javnaði Óbi til 1-1, sum eisini var endaliga úrslitið.



# SAFARI TRANSPORT

TEL 32 22 22

DØGNVAKT 22 22 22

FLOGFRAKT

SJÓFRAKT

SKUNDFRAKT

FLYTIGÓÐS

VANDAMIKIL EVNI

LÍK

DJÓR

LAGUR-HOTELL

AVTALU-FRAKT

TOLL-AVGREIÐSLA

SAFARI GER LÍVIÐ LÆTTARI

*... framhald frá síðu 22*

## Hannes Agnarsson

(149 dystir og 23 mál, 2016-)




- Síðan eg var smádrongur hava grannadystirnir ímóti HB verið serstakir. Eg vaks upp í einari sannari B36-familju, har rivaliseringin og heiðurin at vera best í høvuðsstaðnum hevði serligan týdning. Av somu orsøk var hetta altíð ein tann týdningarmesti dysturin í árinum, sama hvussu liðini annars stóðu seg í

*... framhald frá síðu 22*

landskappingini. Tað er einki broytt. Eg gleði meg framvegis til grannastríðini, tí tey hava meira at siga enn hasi trý stigini. Hesir dystirnir eru meira kensluríkir enn aðrir. Tað er ein fantastisk kensla at vinna á HB, men tað er eisini ræðuligt at tapa grannadystirnar.

- Tað ber illa til at koma uttan um steypafinaluna í 2018 sum tann grannadystin, ið eg minnist best. Tað er helst tann mest minnisverdi dysturin,



© Bjarni Enghamar


Alt innan grill til summarhugnan
weber
Fønix
Mykinesgøta 8 • FO-110 Tórshavn • Tel 31 19 09 • www.fonix.fo


SANSIR
Heildar-loysnir frá ArtiCon
HOTEL BRANDAN
HOTEL BRANDAN
ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

*… framhald frá síðu 23*

sum eg fari at spæla og uppliva yvirhøvur. Orsøkin er sjálvsøgd, tí vit eyðmýktu HB í einari steypafinalu við níggju monnum. Tað hendir ikki hvønn dag. Afturat tí, so javnaði eg sjálvur til 2-2 í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat, so onkursvegna átti eg ein serligan leiklut í sigrinum. Eg hoyri framvegis fyri tann dystin, so hann verður neyvan nakrantíð gloymdur.



Vitja handil okkara á Hjalla



Her fært tú alt til vask og reingerð á einum stað

KEMILUX

FAROE AGENCY

www.faroeagency.fo


MAGN KAFFI
Føroyar
MAGN KAFFI
NÝMALIÐ · VISTFRØÐILIGT
magn

# HVØR EIGUR HANN?

Tað er sunnudagur, og vit spæla ímót TB í Gundadali. Sólin bakar, og lívið kennist ógvuliga gott. Stemningurin í skýlinum er avslappaður og góður. Fleiri av áskoðarunum hava trekt seg oman í skýlið fyri at fáa gleði av vakra sóldegnum - øll munna kenna á sær, at hetta verður ein av síðstu summardøgunum í ár, nú kalendarin sigur 13. august. Niðri í landsyningshorninum sita vit, ein greipa við fýra kvinnum og trimum monnum. Eg, Marita, Sólva, Maibritt, Hans Jákup, Petur Martin og Jákup.

Niðri á síðulinjuni eru leikarar farnir at hita upp, so teir eru klárir, um Dan skuldi fingið tørv á teimum, harímillum

*... framhald frá síðu 28*

Carl Mikkelsen. Vit kenna hann ikki, men Jákup veit at siga, at hann hevði leikt ein góðan dyst við fyrstu deild dagin fyri, og at talan var um spennandi leikara. Eg spyrji "hvør eigur hann?" - eingin veit.

Prátið gongur væl, tað er lætt og merkt av bæði góða veðrinum og optimismuni um, at úrslitið av dystinum nokk skal enda í okkara favør. Prátið gongur alla staðnis, sindur um dystin, sindur um eina veitslu, summi okkara høvdu verið til kvøldið fyri, sindur um samfelagsviðurskifti, men líka nógv um dengang – tá vit vóru í velmaktini. Vit vinkonur hava hildið saman í góð fjøruti ár næstan, og hevur B36 havt serliga rollu øll árini og verið við til at styrkt henda áralanga vinskap. Dreingirnar, ja hóast allir hava runda fimti, so verða teir enn umtalaðir sum dreingir, tá vit eru á plenuni, kenna vit umvegis B36. Tað er



DPR
SNIKKARAVIRKIÐ

Akranesgøta 4 Tórshavn tel. 317082 **www.dpr.fo**

*... framhald frá síðu 29*

stuttligt, hvussu tað eru fólk, kenningar, sum man kennir, bara tí tey eru B36'arar. Eg hugsi, eg heilsi uppá meira enn helmingin av fólkunum í skýlinum, møti eg teimum á gøtuni ein vanligan mikudag – men spyr tú meg, hvat tey eita? ella hvat tey gera? so er sanniliga ikki vist, at eg veit. Men eg veit tey eru B36'arar, og fyri meg er tað nokk, til at tey hava ein ávísan týdning í mínum lívi.

Móti dystarenda verður Carl skiftur inn. Nú er tað Hans Jákup, ið spyr; 'hvør eigur hann?', heldur ikki hesaferð er tað nakar, sum veit. Ungi maðurin ger ikki mætari enn at skorað fáar minuttir seinni. So tað er helst okkurt um tað sum Jákup segði, at hetta var ein spennandi leikari, tí at skora í sínum debut dysti, tað er nakað, okkum dámar. Og sum man jú ger, so rennur Carl fram við skýlinum fyri at fáa ta viðurkenning sum hann hevur uppiborið. Aftur nú

Nomi
Smykkur & Ur

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI




# FYRSTA FLOKS FLAK BEINLEIÐIS ÚR HAVINUM

# P/F ENNIBERG




hoyrist spurningurin, 'hvør eigur hann?', men enn er tað eingin, sum veit. Tikið í betragtning, hvussu ungur leikarin er, og hvussu gomul vit eru, so er tað ikki neyðturviliga foreldrini vit spyrja eftir, kanska eru tað ommurnar ella abbarnir, vit kenna betur – men heldur ikki tað fingu vit svar uppá henda góðveðursdag í Gundadali.


SEX
KREVUR
SAMTYKKI!

*... framhald frá síðu 34*




Sum flest allir B36arar vita, so hongur ein framúr mynd í B36 húsinum. Myndin er tikin fyri áleið 30 árum síðan - pluss/minus nøkur ár. Á myndini eru fólk, ið annaðhvørt vóru við til at stovna B36, ella á annan hátt hava havt avgerandi týdning, fyri at vit hava hetta felag í dag – hetta felag, sum vit øll eru so góð við. Eg minnist væl, tá myndin var tikin, ja vit eru sågar komin á myndina, hóast tað er ógvuliga týðuligt, at vit eru áskoðarar til myndatøkuna. Vit sótu - eisini tá - í B36 skýlinum, um

*... framhald frá síðu 36*

ikki beinleiðis sama samling, so partur av eini eini størri heild, sum samlingin henda dagin í august í ár eisini hoyrdi til. Tað gjørdu vit nógv. Sótu í B36 skýlinum ella í húsinum. Tá var tað ikki bara besta lið sum dróg - tá at kalla búðu vit í B36 húsinum. Tað var okkara stað at hanga út. Og eisini tá prátaðu vit um alt og einki, tí tað var ikki so nógv tað, sum hevði týdning. Eisini tá var tað felagsskapurin, vinirnir, og okkara felags áhugamál – fótbólturin og kærleikin til B36, sum var tað viktuga. Tá vóru vit í besta aldri, og tá flentu vit eftir teimum 'gomlu', tá tey spurdu, 'hvør eigur hann', tá leikari kom á vøllin. Vit kendu teir jú allar tá - teir vóru vinmenn.

Men tað er hesin felagsskapurin og kenslan av, at vit øll hoyra saman sum ein familja, sum eg havi hug at heiðra. Tí hvussu heppin eru vit ikki at hava hetta saman? At vit, sum liggja um hasa hálvu øldina, enn kenna okkum, sum vóru



Shisa Brand
Faroe Islands

*... framhald frá síðu 37*

vit ársungar, tá vit sita í skýlinum ella eru í B36 húsinum. At tað fyri okkum er heilt nattúrligt, at vit eiga at kenna hvønn unglin á vøllinum – ella tey, sum eiga unglingin, tí onkursvegna gongur ein hvítur tráður ígjøgnum og millum okkum øll. Tann vinskap, sum vit - ung sum gomul - hava bygt upp undir B36 hattinum, ríkar okkum, heldur okkum ung og gevur okkum eina kenslu av, at her er gott at vera. Altíð er tað stuttligast, tá liðið vinnur, sólin skínur og ein nýggjur leikari fær debut og skorar, men allíkavæl er tað altíð hugaligt. Hetta hava vit til felag, vit B36'arar, eins og øll hini feløgini í landinum, hava sína søgu, sína forteljing – felags fyri allar er felagsskapurin og kærleikin.

Góðan dyst!
Sissal



# B36-HÚSIÐ ER VÆL ÚTGJØRT TIL FLEST ØLL TILTØK

Umleið 180 fólk sita væl til borðs í senn í tí stóra salinum.
Køkurin er væl útgjørdur við øllum hentleikum.
Leigukostnaðurin er kr. **7.000,-** fyri eitt kvøld,
íroknað reingerð.

Tosa við B36 fyrst, tí so er óneyðugt at tosa meir !

Ring til Angeleen á **252040**

**www.b36.fo**

# ER BÁTURIN KLÁRUR?

## VITJIÐ SØLUBÚÐ OKKARA!

- Máling (Hempel)
- Zinkklossar
- Reinsi- og vaskievni (Hempel)
- Penslar og tilfar

**Taka bátin upp ella sjóseta?**
**Ring til MEST á tlf 301100**

MEST P/F
J.C. Svabosgøta 31
P.O.BOX 65
FO-110 Tórshavn

tel:+298 301100
fax:+298 301101
info@mest.fo
www.mest.fo






KE BUSSKOYRING

*...Vit hava altíð ein buss*

**Ring**
**210165**







Skraddaraseymaðar loysnir

## Veitari til føroysku vinnuna

Hjá Solar menna vit áhaldandi vørur og tænastur. Hetta optimerar bæði arbeiðsgongdina hjá viðskiftafólki okkara og okkara samskifti við viðskiftafólkið. Vit hava gjørt okkum royndir líka síðan fyritøkan varð grundað í 1919, og hava tí havt góða tíð at menna eitt framúrskarandi úrval av vørum og tænastum.

Vit læra av viðskiftafólki okkara, og í tøttum samstarvi menna vit støðugt teir førleikar, sum vit longu hava. Vit bjóða meira enn bara eina vøru, av tí at vit fara inn í eitt tætt samstarv við kundan fyri at hjálpa at optimera arbeiðsgongdina.

Ring 35 79 33 og hoyr nærri

Solar Føroyar P/F   Brekkutún 2   Hoyvík   tel. 35 79 33   solar@solar.fo   www.solar.fo

# Hví eiga, tá ið **tú kanst leiga?**







HÜNNEBECK

- borgar fyri góðsku

Kaj Andreasen & Co

Tit hava tørvin - vit eru veitarin


BYGMA
BALSLEV
STOLTIR LIÐSPÆLARAR
HJÁ B36
Bygma Balslev - Vegurin Langi - Tel. 345000 - balslev.fo

VITJANDI LIÐIÐ

# HB

1 Teitur **M. GESTSSON** (M)
3 Viljormur **DAVIDSEN**
4 Heðin **HANSEN**
6 Hanus **SØRENSEN**
7 Adrian **JUSTINUSSEN**
8 Dan í **SOYLU**
9 Tróndur **JENSEN**
10 Áki **SAMUELSEN**
14 Jákup **L. THOMSEN**
15 Heri **HJALT MOHR**
16 Pætur **R. JACOBSEN**
17 Bartal **WARDUM**
18 Emil **BERGER**
19 Mikkel **DAHL**
20 Ási **P. DAM**
21 Ejvind **MOURITSEN**
22 Ári **JÓNSSON MOHR**
23 Matthias Præst **NIELSEN**
25 Bjarti **VITALIS MØRK** (M)
26 Dánjal **REGINSSON**
28 Samuel **JOHANSEN CHUKWUDI**
29 Rani **W. SØRENSEN**
30 Leivur **F. GUTTESEN**
31 Djóni **SAMUELSEN**

**Venjari** Jákup Martin Joensen

HVÍTTKLÆDDA HEIMALIÐIÐ

# B36 TÓRSHAVN

1 Mattias **LAMHAUGE** (M)
2 Andrias **H. ERIKSEN**
3 Jann Julian **BENJAMINSEN**
4 Ísak **JONSSON**
5 Sonni Ragnar **NATTESTAD**
6 Eli **FALKVARD NIELSEN**
7 Bjarki **C. NIELSEN**
8 Taufee **SKANDARI**
9 Hannes **AGNARSSON**
10 Valerijs **SABALA**
11 Benjamin **HEINESEN**
12 Mattias **J. HELLISDAL**
13 Emil **WEIHE JOENSEN**
14 Rani **Í SOYLU**
16 Magnus **EGILSSON**
17 Mattias **WEIHE JOENSEN**
19 Erlendur **MAGNUSSON**
20 Andrass **JOHANSEN**
22 Símun **SÓLHEIM**
23 Carl **MIKKELSEN**
25 Silas **EYÐSTEINSSON** (M)
27 Aron **KNUDSEN**
28 Michal **PRZYBYLSKI**
30 Marius **ÁRTING ALLANSSON**

**Venjari** Dan Brimsvík
**Hjálparvenjari** Mikkel Richardt Mortensen

FÓTBÓLTSFELAGIÐ B36 F.C. TÓRSHAVN

## HØVUÐSSTUÐLAR HJÁ B36:

J & K PETERSEN

EST. 2017 HAPS BURGARABARR

ANDY ROBSON TIPS

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

RASKA •1977•

PIZZA 67

magn

LAVAZZA

SUÐUROYAR SPARIKASSI

PETUR LARSEN Since 1971

Ford

Jolly

GEISA GRILL BARR

Yndi

THETIS

FISHPROTEIN

motussport.com

Joma

Fønix

BYGMA BALSLEV

Maria Poulsen

FAROE SHIP

MTV - Byggivirkið
Sethús í elementum, ein skjót og dygdargóð loysn
Tlf: + 298 371787 Mob: + 298 214587 mtv@olivant.fo
Fax: + 298 372787 Mob: + 298 284769 www.mtv.fo